# Fundar innkalling

# Býráðið

**Dagfesting:** 24.09.2018 kl. 20:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir:: Jóhan Christiansen
Hanna Jensen
Brandur Jacobsen
Árni Jacobsen
Hjalti Dalheim
Tollakur Joensen
Hans Mourits Foldbo
Gudny Langgaard
Uni Rasmussen

Vara limir:

Nevndarskrivari:

| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar** | | | |
| 58/18 | 18/00341-2 | Tilmæli - Umsókn um keyp av undirlendi á festinum 100a í Syðrugøtu. | 2 |
| 59/18 | 18/00321-4 | Fíggjarætlan 2019 | 3 |
| 60/18 | 18/00275-3 | Tilmæli - Útbjóðing av verjugarðum á havanrøkinum á Toftanesi í Leirvík | 4 |
| 61/18 | 18/00186-1 | Mál 18/00186 Litir í Leiki 2018/19. Málslýsing og tilmæli. | 6 |
| | | | |

## 58/18 Tilmæli - Umsókn um keyp av undirlendi á festinum 100a í Syðrugøtu.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 21.09.2018 | 33/18 | 18/00341-2 |
| 2 Býráðið | 24.09.2018 | 58/18 | 18/00341-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið skriv frá Búnaðarstovuni viðv. umsókn um keyp av undirlendi á festinum, sum er partur av matr. nr. 100a í Sýðrugøtu.<br><br>Umsøkjarin ynskir at keypa partin av matr. nr. 100a, sum er millum Deildará og Matará (sí viðheft skjøl).<br><br>Málið hevur verið til viðgerðar hjá Búnaðarstovuni og umhvørvisstovuni, nú er Eysturkommuna biðin at ummæla hetta. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin viðmælir at umsøkjarin (festari av matr. nr. 100a í Syðrugøtu) kann keypa undirlendi á festinum á matr. nr. 100a í Syðrugøtu. |

## 59/18 Fíggjarætlan 2019

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 20.09.2018 | 60/18 | 18/00321-4 |
| 2 Býráðið | 24.09.2018 | 59/18 | 18/00321-4 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til hjál. tilfar frá umsitingini. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan verður beint í føstu nevndinar til víðari viðgerð. |

**Viðtøka Fíggjarnevnd 20. september 2018**

Samtykt at leggja fyriliggjandi uppskot fyri býráðið til viðgerðar.

# 60/18 Tilmæli - Útbjóðing av verjugarðum á havanrøkinum á Toftanesi í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 20.08.2018 | 30/18 | 18/00275-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 23.08.2018 | 58/18 | 18/00275-3 |
| 3 Býráðið | | | 18/00275-3 |
| 4 Vinnunevndin | 10.09.2018 | 23/18 | 18/00275-3 |
| 5 Fíggjarnevnd | 20.09.2018 | 62/18 | 18/00275-3 |
| 6 Býráðið | 24.09.2018 | 60/18 | 18/00275-3 |
| 7 Byggi - og býarskipanarnevnd | 21.09.2018 | 35/18 | 18/00275-3 |

**Málslýsing:**

Eftir uppgangin, sum var í Leirvík tann 25 november 2017, har m.a nýggi bygningurin hjá El-Teknik fekk skaða, hevur umsitingin kannað hvat kann gerast fyri at fyribyrgja at tað hendir aftur.

Niðurstøðan bleiv, at besta loysnin er at hækkað brimverjugarðin nakað (uml. 1 metur) og at gera ein stuðlagarð innanfyri.
Talan er um at hækkað brimverjugarðin og gera stuðlagarð frá landsvegnum og uml. 105 metrar úteftir.

Licitatión var 14 aug 2018.
Eitt tilboð kom inn. Tilboðið er áljóðandi á 964.722 kr. uttan mvg.

Hetta er innanfyri metingina hjá okkum.

Eftirfylgjandi hava fólk gjørt vart við at tað vegna útsjónd er óheppið at hækka garðin. (sí viðhefta mail).

**Ískoyti 20/9-18**
Umsitingin hevur kannað kostnaðin eins og Vinnunevndin hevur samtykt á fundi tann 10/9-18.
Fleiri kostnaðarmetingar eru gjørdar, og er metti kostnaður millum 1 og 1,4 mió. kr. alt eftir hvussu høgur garðurin verður.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Málið var viðgjørt av býráðnum 26 feb. 2018, tá bleiv samtykt at innheinta tilboð.

Peningur er ikki settur av til hetta arbeiði í 2018, men eykajáttan verður givin, um arbeiðið skal gerast.

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til at taka av tilboðnum, sum er áljóðandi á 964.722 kr. uttan mvg. og gera arbeiði.

**Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevnd 20. august 2018**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at taka av tilboðnum og seta arbeiði í gongd. Og veita eina eykajáttan á 964.722 kr. + mvg.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 23. august 2018**
Einmælt samtykt at útseta málið til komandi fund.

**Viðtøka Vinnunevnd 10. september 2018**
Vinnunevndin mælir til at umsitingin metir um, og kannar kostnaðin av at einans at stoypa verjugarðin, har hæddin á verjugarðinum antin er 2 ella 3 metrar høgur, og styrktur samsvarandi , sum eina alternativa loysn.

Vinnunevndin metir, at tað er umráðandi at kanningin fyriliggur áðrenn komandi býráðsfund.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 20. september 2018**
Fíggjarnevndin mælir til at stoypa garð sum er 3 metrar høgur, vísandi til fyriliggjandi uppskot.

## 61/18 Mál 18/00186 Litir í Leiki 2018/19. Málslýsing og tilmæli.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 11.06.2018 | 54/18 | 18/00186-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 11.06.2018 | 49/18 | 18/00186-1 |
| 3 Býráðið | 11.06.2018 | 41/18 | 18/00186-1 |
| 4 Fíggjarnevnd | 23.08.2018 | 56/18 | 18/00186-1 |
| 5 Býráðið | 24.09.2018 | 61/18 | 18/00186-1 |

**Málslýsing:**

Í fjør samtykti býráðið at seta 100.000 kr. av til royndarverkætlanina Litir í leiki. Upphæddin bleiv sett av til undirvísing av einum árgang + musiktól.
Skúlastjórin letur væl at fyrsta árinum, og heldur avgjørt, at verkætlanin skal halda fram og útbyggjast við tveimum og til síðst trimum árgangum. Skal verkætlanin Litir í Leiki verða optimal skulu vit hava tríggjar árgangir sum minimum. Næsta mál er sostatt at fáa tveir árgangir.

Hvør árgangur í Litir í Leiki krevur 6 tímar um vikuna frá musikkskúlaskipanini. 6 tímar um vikuna fyrsta árið, næsta árið 12 tímar og triðja árið 18 tímar.

**Høvuðsfíggingin verður/er hendan (tveir árgangir):**

- Musikkskúlaskipanin kemur við tveimum tímum (her rindar kommunan helvtina) 11.800 x 2 árgangir= 23.600 kr.
- Lokali musikkskúlin kemur við tveimum tímum (kosta onki)
- Eysturkommuna kemur við teimum tímum (hetta betalir kommunan alt) 2 x 11.800 x 2 árgangir= 47.200 kr.

Samlaði kostnaðurin er 70.800 kr. pr. ár fyri ein árgang + koyring. Samlaði kostnaðurin fyri tveir árgangir er sostatt 141.600 kr.

Málið snýr seg um vit vilja útbyggja verkætlanina Litir í Leiki, og um musikkskúlaskipanin (MMR og lokali musikkskúlin) eru sinnað veita Litir í Leiki tímarnar. T.v.s. fortreytin er at allir partar spæla við.

7. juni 2018

Umsitingin hevur tosað við musikskúlaskipanina viðv. kostnaði av klokkutímun í skipanini. Ein klokkutími kostar 25.000 kr. um árið, tó uttan koyring.

Skal Eysturkommuna sjálv gjalda fyi ein árgang við "Litir í Leikii" er kostnaðurin fylgjandi:

6 næmingar verða í "Litir í Leiki" og tey fáa ein hálvan undirvísingartímar í part + ein tíma við felagundirvísing.
Hetta er sostatt 4 undirvísingartímar og er kostnaðurin sostatt 4 tímar x 25.000 kr. = 100.000kr.

Ferðingin hjá undirvísaranum er: 131,94km x 3,20kr = 16.044kr.

6 ljóðfør á 4000 kr. pr. stk. = 24.000 kr.

| |
|---|
| Samlaður prísur fyri ein árgang í Litir ít Leiki er sostatt: **140.044 kr.**<br><br>**Ískoyti 20. august 2018**<br>Á býráðsfundinum tann 11/6-18 bleiv samtykt at veita eykajáttan á kr. 50.000,00 eingin broyting er frá 1. viðgerð |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at umsitingin arbeiðir víðari við málinum. |

**<u>Viðtøka Mentanarnevndin 14. maj 2018</u>**
Mentanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini, og samtykkir, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum

**<u>Viðtøka Mentanarnevndin 11. juni 2018</u>**
Mentanarnevndini mælir til, at umframt verandi árgang í Litir í Leiki, so skal Litir í Leiki eisini fevna um næmingur sum byrja í 1. flokki í august 2018. (Víst verður til skjalið "Uppgerð HMF").

**<u>Viðtøka Mentanarnevndin 14. maj 2018</u>**
Mentanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini, og samtykkir, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum

**<u>Viðtøka Mentanarnevndin 14. maj 2018</u>**
Mentanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini, og samtykkir, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum

**<u>Viðtøka Mentanarnevndin 14. maj 2018</u>**
Mentanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini, og samtykkir, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum

**<u>Viðtøka Mentanarnevndin 14. maj 2018</u>**
Mentanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini, og samtykkir, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum

**<u>Viðtøka Fíggjarnevnd 11. juni 2018</u>**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

**<u>Viðtøka Býráðið 11. juni 2018</u>**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 24. august 2018**
Einmælt samtykt at veita eykajáttan eins og samtykt við 1.viðgerð